# Selatrað




*Í farnu viku vitjaði Sosialurin og Rás2 á Selatrað, har tosað varð um vánaliga vegasambandið til bygdina. Teknarin á blaðnum, Óli Petersen var skjótur við blýantinum og longu dagin eftir, stóð henda tekningin á baksíðuni á Sosialinum*



## Tey eldru út at sparka

Ein avgjørd fortreyt fyri at fólk vilja búseta seg á Selatrað – bæði lutvíst og ikki minst heilt – er at grundøki eru tøk og helst eisini arbeiðspláss.

Eitt uppskot hevur verið at leggja eitt sambýli í kommununi júst í vakra umhvørvinum við viðarlundina og ánna gjøgnum bygdina, men hetta vann ikki frama í hesum umfarinum.

Í dag er støðan hon, at grundøki eru tøk norðarlaga í bygdini, har fleiri summarhús longu standa.

Hetta er eitt tað vakrasta staðið í bygdini, og mong eru tey sum halda, at her átti ikki at verið ov nógv bygt, hóast nógv eru um boðið at fáa grundøki her í nánd av Skóta-deplinum.

Og sum Sanna tekur til: - Tað er nóg mikið av "svørtum" húsum í bygdini!

Nógv av summarhúsunum standa myrk ein stóran part av árinum, og tí er umráðandi fyri Sannu at ein fær gjørt hetta økið meiri áhugavert.

Eftir hennara sannføring átti ein at hava nøkur summarhús her, Skóta-depilin og campingplássið á hesum staði. Best hevði verið, um bygdarfólkið fekk fría atgongd til havnarøkið, bátarnar og annað virk-semið har.

Um tað er lagnunnar speisemi, er ilt at meta um. Men í løtuni er grivið út fyri einum FIFA-sparkivølli beint við sethúsini hjá Sannu.

Mong undra seg yvir, hvør skal nýta henda vøllin. Børnini fække í tali og fá fólk flyta til her.

– Tað eru kanska vit eldru sum skulu út at sparka bólt, sigur hon við einum brosi.